# Yvirlýsing frá primer-heilsutænastuni í Suðuroynni

Í gjár, 25. januar 2010, hevði primer-heilsutænastan í Suðuroynni fund um støðuna í samband við at umstøðurnar hjá kommunulæknunum í Suðuroynni eru so vánaligar. Á fundinum vóru umboð fyri kommunulæknar, heimasjúkrarøktafrøðingar og heilsufrøðingar í Suðuroynni.

Ein vælvirkandi primerheilsutænasta er grundarlagið undir heilsutrygdini hjá borgarunum. Samstarvið innan primer-heilsutænastuna í Suðuroynni er fyrimyndarliga gott. Nettupp hetta hevur stóran týdning, tí primer-heilsutænastan er eitt toymið har øll eru tengd hvør at øðrum. Toymið er eins og ein keta, dettur eitt lið burtur, so er ketan lítið verd.

Í dag er Suðuroyggin í eini serstøðu, tí vit hava tveir ungar kommunulæknar, sum veruliga ynskja at búgva og virka her í oynni. Hendan serstøðan er eitt sterkt grundarlag at byggja framtíðina á.

Tá tað er sagt, so eru tað tó lítið virðilig og sømilig kor, at kommunulæknarnir í Suðuroynni skulu arbeiða frá kl. 8.00 til kl. 16.00 og harnæst hava kvøld- og náttarvakt, fyri síðani at møta aftur til arbeiðis kl. 8.00 morgunin eftir. Slíkar umstøður kann og vil ongin virka undir.

Heimasjúkrarøktafrøðingarnar síggja stóran vanda í, at umstøðurnar hjá kommunulæknunum í Suðuroynni eru so vánaligar, at hesir velja at rýma.

Ein loysn á trupulleikanum er, eins og kommunulæknarnir og Suðuroyar Sjúkrahús hava víst á, at Suðuroyar Sjúkrahús, eins og Klaksvíkar Sjúkrahús, um kvøldið og náttina fer at virka sum skaðastova. Tað vil siga, at kvøld- og náttarvaktin, sum kommunulæknarnir nú røkja, verður flutt á skaðastovuna á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Hendan loysn inniber, at ein hjálparlækni verður settur at hava ábyrgdina av skaðastovuni á Suðuroyar Sjúkrahúsi, eins og tað er gjørt á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Hóast læknatrot á summum økjum, so eru ongir trupulleikar at fáa hjálparlæknar. Og er tað tískil bert ein spurningur um politiskan vilja til at raðfesta soleiðis, at pengingur verður settur av til ein hjálparlækna á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Vit krevja, at ein hjálparlækni verður settur á Suðuroyar Sjúkrahúsi sum skjótast, soleiðis at heilsutrygdin og heilsutænastan til borgarar í Suðuroynni ikki verður fyri stórum afturstigi.

*Vegna*
**primer-heilsutænastuna í Suðuroynni**

**Heimasjúkrarøktarfrøðingarnir í Suðuroynni**

# Krav um fund við heilsumálaráðharran

**Borgarstjórarnir í Suðuroynni hava á fundi í kvøld viðgjørt læknaviðurskiftini í oynni.**

Á fundi, sum borgarstjórarnir skipaðu fyri tann 9. mai 2009 vóru teir, landsstýris- og løgtingslimir úr oynni kunnaðir um støðuna. Sjúkrahúsleiðslan og læknarnir kunnaðu um støðuna og útlitini - vóru viðurskiftini ikki tikin í álvara og bøtt. Á hesum sama fundi løgdu sjúkrahúsleiðsla og læknar uppskot fram, sum vísti á eina brúkiliga loysn viðvíkjandi læknaviðurskiftunum.

Av tí, at eingin loysn er fingin á viðurskiftunum – heldur eru tey versnað, eru borgarstjórarnir samdir um, at krevja ein fund við landstýrismannin í heilsumálum Aksel Johannesen, tá hann kemur suður – eftir ætlan í næstu viku.

Borgarstjórarnir harmast um - og góðtaka ikki, at málið ikki er tikið í nóg stórum álvara, og at suðuroyingar skulu liva undir tílíkum ótolandi ótryggum viðurskiftum.

*27. januar 2010*

**Hildur Vestergård, Sumbiar kommuna**

**Kirstin Strøm Bech, Vágs kommuna**

**Mikkjal Sørensen, Porkeris kommuna**

**Delmar Tausen, Hovs kommuna**

**Eyðdis Ellendersen, Fámjins kommuna**

**Kristin Michelsen, Tvøroyrar kommuna**

**Otto West, Hvalbiar kommuna**

# Kunningarskriv til okkara fólkavaldu

**HARRY JENSEN**
bygdarráðsformaður

Tá tað vísir seg, at tað er ógvuliga trupult, fyri ikki at siga ómøguligt, at fáa samskifti við okkara fólkavaldu politikarar um ymisk viðurskifti í Skúgvi, vil eg gjøgnum portalar og bløð gera okkara løgtingslimir varugar við, at teir aftur hava fingið eina skrivliga áheitan frá okkum. Hesuferð er talan um farmaflutningin.

Tá vit í fjør royndu at ávirka, so vit ikki mistu játtanina til havnargerð, var tað at kalla ongin politikari, sum svaraði.

Ta einu ferðina sendu vit teldupost til allar løgtingslimirnar, umframt øll landsstýrisfólkini, løgmann og løgtingsformannin.

Minnist meg rætt, var tað bara Bjørn Kalsø, sum svaraði.

Eg ringdi til onkran av hesum fólkum, men øll søgdu seg ikki hava sætt nakað teldubræv.

Ein ringdi, og spurdi hví hann onki bræv hevði fingið, men brævið var sent til allar telduadressurnar í tinginum.

Einaferð sendu vit innskrivað brøv til allar flokkar á tingi, tá fingu vit kvittan fyri móttøku – og onki annað.

Eg havi hug, til stuttleika, at nevna, hvussu tað gekk tá vit møttu Alfred Olsen, tingmanni á gøtuni í Havn.

Vit vóru í Havn í øðrum ørindum fyri kommununa, stutt eftir at hesi teldubrøv vórðu send.

Vit møttu Alfred á Vaglinum, og spurdu hann, hvat hann segði um bræv okkara.

Hann stóð tá sum ein smádrongur, ið hevur gjørt okkurt keðiligt, hugdi niður og skavaði í vegin við skógvatrantinum, í meðan hann segði seg ikki hava sætt nakað bræv.

Knappliga tendrar okkurt ljós, og maðurin nærmast loysnar frá vegnum og sigur: “Nú veit eg hvat tit skulu gera. Sendið eitt bræv til Rættarnevndina, har eri eg formaður, vit hava fund í næstu viku, tá skal eg taka tað upp, og so frætta tit aftur”.

Tað gjørdu vit so, men sum vant kom onki svar.

Hesaferð skrivi eg mest fyri at kunna tykkum politikarar um, at bræv er sent til allar flokkar á tingi, umframt til Johan Dahl landsstýrismann, so kunnu tit í hvussu er ikki siga at tit onki vita.

Vónandi vaknar onkur, og setur seg somikið inn í hetta, fyri okkum so týdningarmikla mál, at okkurt verður gjørt.




# Afturstig fyri heilsuverkið um smærru sjúkrahúsini verða niðurløgd



**BJØRN KALSØ**
løgtingsmaður

Í politisku skipanini og umsitingini eru sterkar kreftir, sum arbeiða fyri at niðurleggja smærru sjúkrahúsini. Hetta er ein vánalig og illa umhugsað ætlan, sum verður stórt afturstig fyri heilsuverk og borgarar landsins, verður hon framd.

**Færri og verri tilboð**
Tað er sera ivasamt um tilboðini innan føroyska heilsuverkið høvdu verið so fjølbroytt og á tí støði, tey eru í dag, høvdu vit bert eitt sjúkrahús í landinum. Fleiri dømi eru um, at smærru sjúkrahúsini hava gingið undan innan nýggjar kanningar og viðgerðargreinar.

Sum dømi kann nevnast, at Klaksvíkar Sjúkrahús var fyrst at fara undir kikarakanningar í liðum í Føroyum, fyrst við skipaðum liðútskiftingum, fyrst við framkomnari urologi, fyrst við medisinskum viðgerðum av nýrasjúkum, fyrst við framkomnari viðgerð av klumpfóti, fyrst við framkomnari ortupediskari viðgerð av hondum og akslum, bert fyri at nevna nøkur dømi.

Fleiri av nevndu frambrotum innan kanningar og viðgerðir er Landssjúkrahúsið seinni farið undir. Hesar ganga nú undir heitinum dupultfunktiónir, sum skulu leggjast saman og endaliga staðsetast á Landssjúkrahúsinum. Spurningurin er bara um hesi tilboð, sum bjarga mannalagnum og spara landskassanum stórar upphæddir, høvdu funnist í Føroyum í dag, um bert eitt sjúkrahús var í landinum. Sjálvur eri eg ikki í iva um, at tað høvdu tær ikki.

**Kostnaðarmiklari**
Mangt er eisini, ið bendir á, at skipanin hevði verið kostnaðarmiklari við einum sjúkrahúsi. Frá 2000 til 2009 er játtanin til Landssjúkrahúsið hækkað við knøppum 160 mió. kr., sum svarar til góð 71%. Sama tíðarskeið er játtanin til ávikavist Klaksvíkar og Suðuroyar Sjúkrahús bert hækkað við uml. 19 mió. kr, ið svarar til 46% og uml. 16 mió. kr., sum svarar til 51%.

Í sama tíðarskeiði hava smærru sjúkrahúsini kortini, eins og Landssjúkrahúsið, megnað at ment verandi og nýggjar viðgerðir, og liggja framman fyri Landsjúkrahúsið, tá um nøgdsemi millum sjúklingar ræður. Hetta vísti nøgdsemiskanning, sum var gjørd herfyri.

Søguliga hava smærru sjúkrahúsini eisini betur megnað at halda teirra játtan. Fleiri umbønir um eykajáttan frá Landssjúkrahúsinum prógva at so er.

Lítið er, sum bendir á, at vit fáa eina bíligari og betri skipan við einum stórum sjúkrahúsi. Tølini og royndirnar benda heldur á tað øvugta. Jú størri eindin er, verri er hon at stýra. Samstundis sum dynamikkurin og hugurin at endurnýggja og betra seg hvørvur, um eingin er at kappast og samstarva við.

**Sjúklingurin heldur enn miðsavnan í miðdepilin**
Kann tí ikki góðtaka ætlanirnar at leggja niður smærri sjúkrahúsini. Heldur eigur at verða farið undir eina ætlan, har aðalmálið er at brúka øll trý sjúkrahúsini optimalt. Ivist onga løtu í, at brúk er fyri hvørjum króki. Bíðirøðirnar eru mangan stórar.

Málið kann røkkast í samstarvi á jøvnum føti millum tey trý sjúkrahúsini, har aðaltátturin er at seta sjúklingin heldur enn miðsavnan í miðdepulin.

**Landsstýrismaðuri átti at komi á pallin**
Sakni at nýggi landsstýrismaðurin trýnir á pallin og greitt boðar frá, at frælsið hjá smærru sjúkrahúsinum at virka ikki verður skert í hesum samgonguskeiðnum.

Ger hann ikki tað kann hann koma í rasshaft av eftirburðinum hjá undanmanninum, sum burturav arbeiddi við sentralistiskum ætlanum á sjúkrahúsøkinum.

Skal til endans leggja dent á, at greinin er ætlað, sum greið ávaring ímóti ætlanunum um at leggja niður smærru sjúkrahúsini, og ikki sum kritikkur av arbeiðnum, læknar, sjúkrasystrar og onnur starvsfólk á Landssjúkrahúsinum gera.